

## Kanna møguleikarnar at gera koyritekniska breyt

Ein arbeiðsbólkur er nú settur og farin til verka at kanna møguleikarnar at gera eina koyritekniska breyt í Føroyum. Tað hevur í mong ár verið ynski um at fáa eina venjingarbreyt við hálkubreyt í Føroyum, har bilførarar millum annað kunnu læra grundleggjandi atburð við bilakstur, týdningin av at laga ferð, stýring og bremsing eftir umstøðunum og at royna vandamiklar støður í einum tryggum umhvørvi. Annika Olsen, landsstýriskvinna, hevur tí avgjørt at seta ein arbeiðsbólk at kanna møguleikarnar at gera koyritekniska breyt. Í bólkinum eru Jákup Jacobsen, umboð fyri Akstovuna, Gudrun Mortansdóttir Nolsøe, fulltrúi í Innlendismálaráðnum, Umboð fyri Landsverk, Helgi Magnusarson, umboð fyri Løgregluna, Sølvi Reinert Hansen, umboð fyri Ráðið fyri Ferðslutrygd, og Jari Lykke, umboð fyri Koyrilærarafelagið. Bólkurin hevur í dag havt sín fyrsta fund og skipaði seg við Jákup Jacobsen, stjóra á Akstovuni, sum formanni. Miðað verður ímóti, at álitið skal verða liðugt 1. januar 2010.

# Vinnan spurd fyrst um CO2 skerjingar

**Landsstýriskvinnan í umhvørvismálum vil fyrst tryggja sær eitt realistisk uppskot um CO2 skerjingar frá vinnulívinum, áðrenn politiski arbeiðsbólkurin kemur við í arbeiðið. Bjørt Samuelsen, tingkvinna, undrar seg stórliga yvir arbeiðsháttin hjá landsstýriskvinnuni**

UMHVØRVI
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Hóast ein politiskur fylgibólkur bleiv settur longu tíðliga í ár at gera tilmæli til um CO2 skerjingar, skal bólkurin ikki vænta at sleppa upp í leikin, fyrr enn aktørar frá vinnulívinum hava sett treytirnar.

Síðani politiski bólkurin bleiv settur, hevur landsstýriskvinnan í umhvørvismálum, Annika Olsen, saman við Landsstýrinum nevniliga sett sín egna arbeiðsbólk við umboðum frá vinnulívinum at gera eitt "realistiskt" uppskot til CO2 skerjingar, sum landsstýriskvinnan málber seg.

- Handan bókin kenni eg onki til, sigur ein undrandi Bjørt Samulesen, limur í politiska fylgibólkinum.

### Løgin arbeiðsháttur

Bjørt Samuelsen heldur tað vera serstakliga løgi, at politiski fylgibólkurin ikki er kunnaður um, hvør hevur sitið og arbeitt við hesum málinum seinnu mánaðirnar. Politiski fylgibólkurin hevur nevniliga ongantíð verður kallaður á fund við Landsstýrið, síðani bólkurin varð settur í mars mánaða.

Sambært Anniku Olsen er orsøkin, at onki ítøkiligt hevur verið at kalla bólkin inn til fundar um. Ikki fyrr enn komandi týsdag, tá ið umboð fyri Reiðarafelagið, SEV, Fiskimálaráði, Innlendismálaráðið, Jarðfeingi og Fíggjarmálaráðið handa landsstýriskvinnuni eitt CO2 tilmæli.

- Tað er fínt, at vinnulívið er við í hesum arbeiðinum, men tað skal sjálvandi ikki vera vinnulívið, heldur enn politiskar visjónir, sum stingurumhvørvispolitikkin komandi árini út í kortið, sigur Bjørt Samulesen, sum enn onga kunning hevur fingið um, hvussu hetta arbeiði verður skipað beint nú.

- Tað kann í øllum førum ikki vera meiningin, at vit sum politiskur aktørur bara koma inn fyri at blástempla eitt uppskot frá vinnulívinum, sigur Bjørt Samuelsen.

### Tryggjar realistiskt uppskot

Hóast Bjørt Samuelsen fegnast um, at okkurt hendir í hesum málinum, er hon vónbrotin av, at politiski bólkurin ikki hevur verið við í arbeiðinum higartil.

- Serliga tí, bæði løgmaður og landsstýrskvinnan frá byrjan hava lagt áherðslu á, hvussu stóran týdning tað hevur, at endaliga CO2 tilmæli hevur eitt sterkt politiskt kjølfesti. Hetta er jú grundarsetinurin undir einum umhvørvispolitikki, sum skal røkka mong ár inn í framtíðina, og tí er tað heilt avgerandi, at tað hevur breiða politiska undirtøku, sigur Bjørt Samuelsen.

Hesum er landsstýriskvinnan í umhvørvismálum púra samd í.

- Tí havi eg eisini gjørt alt fyri at tryggja mær, at uppskotið, vit koma við, verður realistiskt og haldbært. Til tað krevst eitt neyvt grundarlag at arbeiða út frá, og tað er hetta grundarlagið, arbeiðsbólkurin hevur greinað út og nú kann leggja fram til politiska viðgerð, sigur landsstýriskvinnan í umhvørvismálum.

Bjørt Samulelsen undrar seg tó framvegsis yvir vantandi kunningina frá landsstýriskvinnuni, og yvir, at politiski fylgibólkurin, hon hevur sett, als onga ávirkan hevur haft á setanina av einum heilt triðja arbeiðsbólki við umboðum frá vinnulívinum.

Hartil undrar tað Bjørt Samuelsen, at bólkurin heldur ikki er kunnaður um møguligar samráðingar við danir i sambandi við føroyska CO2 tilmælið, nú bert smáir tríggir mánaðir eru til stóru Veðurlagsráðstevnuna í Keypmannahavn.



*Tað mugu vera politiskar visiónir heldur enn krøv frá vinnulívinum, sum stinga føroyska umhvørvispolitikkin út í kortið, sigur Bjørt Samulesen, tingkvinna*



*Eg havi tikið vinnuna uppá ráð fyri at tryggjað mær eitt so realistiskt grundarlag, sum til ber at arbeiða politiskt út frá, so alt CO2 tilmælið ikki dettur á gólvið, sigur landsstýriskvinnan í Umhvørvismálum*

# Zarepta: Lega fyri 18 ár og eldri viðger áhugaverd evni

**Vikuskiftið 4.-6. september verður lega í Zarepta fyri tey, sum eru 18 ár og eldri, og hesaferð verður evnið »Gud skaparin og heilagleiki Hansara«, sum bíbliulærarar fara at viðgera frá ymiskum síðum**

ATRÚNAÐUR
*Tíðindaskriv*

Legan byrjar fríggjakvøldið 4. september, har byrjað verður við, at luttakararnir fáa ein náttúrðabita klokkan 19:00.

Seinni fríggjakvøldið, tá ið fólk eru komin upp á pláss, verður ein løta í salinum, har Rúni Hansen, sum dagliga starvast í altjóða vinnuligum umhvørvi, fer at tosa út frá evninum »at halda seg ódálkaðan av heiminum«.

Leygarmorgunin verða tveir bíbliutímar, har skapanarverkið verður høvuðsevnið.

Teir báðir, Jens Bech og Richard Schwartsson fara úr ymiskum sjónarhornum at lýsa partar av skapanarverkinum.

Seinastu løtuna sama kvøldið verður eitt pallborð í salinum, har sama evnið verður viðgjørt og høvi verður at seta spurningar. Saman við áðurnevndu undirvísarum kemur eisini Símun Absalonsen at luttaka í hesum pallborði.

Eftir ein góðan døgurðabita á middegi leygardagin verður seinnaparturin tøkur hjá legeluttakarunum til egna disposition, tað veri seg fríløtur, kaffi, prát, hugni, spæl, ítrótt, túr ella hvat hugurin er til.

Áðrenn náttúrða verður ein løta í salinum við sangi og onkrum filmsbrotum, sum eisini taka støði í skapanarverkinum og Skaparanum.

Beint eftir náttúrða verður ein løta í salinum, har John í Skemmuni tekur táttin frá fríggjakvøldinum uppaftur um heilagleika Guds og ynski hansara um, at børn Hansara halda seg ódálkaði av heiminum.

Sunnumorgunin fer Poul Færø at hava tann seinasta bíbliutíman á leguni, sum eisini tekur støði í heilagleika Guds.

Legan endar á middegi við døgurða. Síðan verður ruddað av, og fólk leggja leiðina heimaftur.

Tilmelding sí lýsing aðrastaðni í blaðnum.